## Djumic heldur fram

Heimasíðan hjá Neistanum skrivar, at felagið og serbiski Jugoslav Djumic eru samd um at leingja avtaluna. Soleiðis verður Djumic aftur í hópinum hjá steypavinnarunum í komandi kappingarári.
Jugoslav Djumic hevur spælt við Neistanum seinastu tvey árini. Hann er strikuspælari og hevur roynst væl í verjupartinum.




## Neistin fer út í Evropa

Neistin skal aftur í summar royna seg í altjóða høpi. Tað vátta Niels Mortensen og Hjalmar H. Petersen, sum vara av besta mansliðnum hjá felagnum, fyri heimasíðuni hjá Neistanum. Neistin vann í februar steypakappingina, og tað gevur teimum atgongd til evropeisku kappingina fyri steypavinnarar. Og felagið hevur tikið av møguleikanum. Høvuðsstaðarfelagið royndi seg eisini í Evropa í fjør. Mótstøðuliðið var Lovcen úr Montenegro, og hóast tað eydnaðist føroyingunum at vinna á heimavølli, tapti liðið samanlagt.

## Flogbólts-bólkarnir klárir

**Tað er nú greitt, hvussu bólkaspølini í flogbóltinum á Oyggjaleikum skulu skipast hjá bæði kvinnum og monnum**

FLOGBÓLTUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Fríggjadagin varð lutur kastaður um, hvussu spælast skal í bólkaspælinum í flogbólti á Oyggjaleikunum í Álandi í summar. Bæði hjá monnum og kvinnum gjørdust Føroyar nummar tvey á Rhodos, og við støði í hesum eru bæði liðini styrkismett sum nummar tvey aftan fyri Saaremaa, sum vann bæði gullmerkini.
Menninir eru bólkaðir saman við Álandi, Caymanoyggjunum, Gotlandi og Guernsey.
Í hinum bólkinum eru Saarema, sum Føroyar taptu ímóti í finaluni á leikunum seinast, umframt Grønland, Bermuda, Jersey og Gibraltar.
Kvinnurnar skulu spæla ímóti Menorca, Grønlandi, Gotlandi, Jersey og Caymanoyggjunum.
Eisini hjá kvinnunum er Saarema í hinum bólkinum. Tær taptu eisini finaluna ímóti Saarema seinast.
Hini liðini í hinum bólkinum eru Barmuda, Rhodos, Áland, Guernsey og Hitra.

07 Vestur-ÍF 1-1 (0-0):

# Hvørgin kann brúka stigið

**07 Vestur og ÍF fingu eitt stig hvør, tá liðini hittust í Sørvági í gjár. Eitt stig, sum hvørgin av liðunum av álvara kann brúka til nakað**

*07 Vestur*

*ÍF*

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*




*Hendrik Rubeksen, sum her er í nærdysti við Frank Poulsen, legði 07 Vestur á odda tíðliga í seinna hálvleiki*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Eitt stig telur ofta lítið í fótbólti. Og tað gjørdi tað hjá bæði 07 Vestur og ÍF í gjár.
Á heimavøllinum í Sørvági skal samanlagda felagið úr Vágum helst hava fult hvørjaferð móti liðunum í miðbólkinum. Og á útivølli móti uppflytarum skulu fuglfirðingar hava trý stig, um teir ikki aftur í ár vilja liggja væl aftanfyri hini oddaliðini.

### Lítil ferð

Dysturin var lítið at gleðast um. Liðini – hóast tey ikki ætlaðu tað – vóru sera varin og løgdu lítið fyri í framrættaða spælinum. Undan hvíldini var eingin veruligur málmøguleiki, og tað hevur sína orsøk.
Jens Erik Rasmussen var í gjár einsamallur framherji hjá 07 Vestur. Við sínum frálíka bóltførleika og eyga fyri spælinum átti hann helst at spælt longri afturi á vøllinum. Hann hevði tað trupult millum stóru Viggo Johannesen og Poul Ennigarð, sum mannaðu miðverjuna hjá ÍF. Hann hevði fáar málgevandi avleveringar, og lá ofta rættiliga einsamallur.
41 ára gamli Rasmussen átti tó avgerandi avleveringa, tá heimaliðið legði seg á odda stutt eftir steðgin. Hann spældi Hendrik Rubeksen leysan, og havnarmaðurin var tryggur framman fyri Andras Gango í málinum.
ÍF hevði lítið at bjóða. Dánjal á Lakjuni og Andy Olsen, sum spældu í hvør sínari síðu, høvdu fá gjøgnumbrot, og ov sjáldan var Høgni Zachariasen, sum var framherji, við í spælinum.
Gjøgnumbrotini manglaðu hinvegin ikki hjá Tór-Ingari Akselsen. Jan Ellingsgaard royndi at verja fyri honum, men ofta slapp vágamaðurin til baklinjuna.
Tór-Ingar Akselsen var aftur hesaferð millum teir heilt frægu á liðnum hjá 07 Vesturi.

### Tvey reyð kort

ÍF javnaði eina løtu eftir, at heimaliðið hevði fingið leiðslumálið. Nenad Saric ivaðist ikki, tá hann gjørdist leysur innan fyri verjuna.
Móti endanum vóru bæði Balasz Sinkó og Jóan Petur á Stongum vístir av vøllinum, men tað ávirkaði ikki leikgongdina stórvegis. Tað var uppiborið, at bæði liðini fingu eitt stig.

### Hjálpir lítið

Málsetningurin hjá 07 Vesturi fyri kappingarári er at bjarga sætinum í Vodafonedeildini. Í løtuni eru tað trý stig til bjargingina. Tað vísur seg, at B68, AB og ÍF kunnu fáa fult móti ovaru liðunum, og tí eru tílikir dystir, sum tann í Sørvági í gjár, av stórum týdningi hjá vágamonnum.
ÍF hevur nú ikki tapt í seinastu fýra royndunum. Jón Simonsen og fuglfirðingar eru komnir úr keðiligu byrjanuni, sum setti bein fyri stóru ætlanunum í Fuglafirði. Og eitt stig í Sørvági er als ikki vánaligt. Men dystir móti uppflytarum skulu geva fult hjá oddaliðum – serliga tá liðið longu hevur mist óneyðug stig.

## Sagt í 3. hálvleiki

Ein partur av sendingini, 3. hálvleikur, sum Rás2 borðreðir afturvið Vodafonedeildini, eru SMS-viðmerkingar frá lurtarunum. Niðanfyri prenta vit nakrar av teimum mongu viðmerkingunum, sum vórðu sendar inn á 559999 sunnudagin. Tað ovast nevnda varð hesa ferð kosin at vera tey bestu, og fær høvundurin eitt gávukort upp á 500 krónur frá Bygma sendandi fyrsta dagin

*»Tveir klaksvíkingar vóru í morgun farnir til Skard, á veg heimaftur sigur tann eini; tú galø, so tapti Kí aftur. Hvussu veit tú tad, tá vit hava einki rdio hava vid okkum. Noy galø, men eg havi ur, og nú er klokkan farin av 5.«*

*»Gud nádi hini vodafonlidini tä jögvan martin finnur útav at vikingarnir eru bestir tä teir leypa á«*

*»Pál toppar i Rom eg dámid best at botna i vodka«*

*»Tað sær ikki so gælið út hjá KI teir kunna koma upp á 66 stig og man tað ikki fara at rókka til 1 plássi«*

*»Ja, nú er langt síðani at Norðlýsið hevur skriva um fótbólt.«*

*»Síðani Víkingur var stovna hava spælt 4 dystir ímóti NSÍ og úrtøkan er 4 sigrar ikki so galið ha!«*

*»E haldi at kí skal vinna gávukortid Teir hava brúk fyri ambodum frá bygma at byggja lidi uppaftur«*

*»Kanska úrslitið verður 0-7 í klaksvík næsta vikuskifti«*

*»Til næsta dyst vera vit noyddir at smyrja meskarnir hjá mótstødulidnum vid hunang, so at hvepsirnar vera meir agressiva«*

*»Mytan um at havnarmenn ik tola vatn bleiv so sannuliga avnogta i dag.«*

*»Mundi tad vera tann gódi festivalbúffurin,sum hevdi sett í fótin á Keida.«*

*»Um tit skilja, so hevði eg vilja, at øllum gongst væl innan bóltspæl. Góðan dyst.«*